Gera klárt fyri boripalli

Umbor› á Geoscanner er tann mest framkomna útger›in.
Mynd Jens K. Vang

Norska skipi› Geo Scanner fer nú undir seinastu kanningarnar av havbotninum, har Statoil-samtaki› skal bora í juni

OLJULEITING
Jan Müller

Nú ta› bert er hálvt ár til Statoil-samtaki› fer at bora á føroyska landgrunninum ver›ur nú gjørt klárt til risastóra boripallin Sovereign Explorer. T‡sdagin kom serútgjørda skipi› »Geo Scanner« hjá Fugro-Geoteam í Haugesund á Havnina eftir útger›, á›renn ta› heldur lei›ina út á landgrunnin, har Statoil, Phillips, Enterprise og Veba Oil fara at bora í juni næsta ár. Skipi› skal kanna havbotnin rundan um sta›i›, har borurin ver›ur settur í. M.a. ver›ur ney›ugt at vita, hvussu undirlendi› er, har akker› skulu festast í botn. Talan er um at gera seismiskar kanningar í nakrar vikur.

John Inderhaug frá Statoil sigur, at teir vi› hesum kanningunum ver›a lidnir vi› sínar fyrireikingar til at fara undir at bora næsta ár. – Vit hava lagt nógva orku í at gera allar ney›ugar fyrireikingar til boringina, og eg haldi, at hetta nú er vi› at koma undir land.

Boripallurin Sovereign Explorer, sum skal bora fyri Statoil í juni og aftaná fyri Amerada Hess.
Mynd BP

Geo Scanner, sum skal gera seinastu havbotnskanningarnar fyri Statoil, á›renn fari› ver›ur at bora. Tor-shipping umbo›ar skipi›.
Mynd Jens K. Vang

Tilbúgving klár

OLJULEITING OG TILBÚGVING
Jan Müller

Enn er ikki greitt, hvussu ver›ur vi› føroysku tilbúgvingini, nú oljuleitingin byrjar á føroyska landgrunninum í næsta ár. Røddir eru frammi um, at føroyingar ikki megna at fáa tilbúgvingina klára til tí›ina, og at ta› tí ver›ur tilbúgvingin í Aberdeen, sum fer at fevna um føroyskt leitiøki í næsta ár. Sosialurin hevur í skjótt eina viku roynt at fáa úttalilsi frá Kai Morte-nsen í Fískimálast‡rinum, men hann er ikki at hitta. Sí›ani máli› um tilbúgvingina var› flutt fr á Vinnumálast‡rinum til Fiskimálast‡ri› hevur Kai Mortensen fingi› embætisligu ábyrgdina av hesum máli.

John Inderhaug, stjóri í Statoil, sum er ta› felagi›, i› fer fyrst at bora, sigur vi› Sosialin, at teir rokna vi›, at føroyskir myndugleikar klára at vera lidnir til tí›ina. Hann heldur ikki, at ta› er nøkur orsøk til at leggja tilbúgvingina yvir á bretskar myndugleikar, nú hetta náttúrliga er naka›, sum eigur at liggja í Føroyum.

Avger›in um oljuhavn nærkast

Um stutta tí› fara oljufeløgini at bi›ja um tilbo› uppá útger›arvirksemi og harvi› gera av, hvar oljuútger›arhavnin skal liggja

ÚTGER‹ARHAVN
Jan Müller

Skjótt ver›ur greitt, hvør havn í Føroyum, fer at ver›a brúkt til útger›arhavn hjá oljufeløgunum, sum byrja sítt borivirksemi um eitt hálvt ár. Í hesum døgum eru fólk frá Statoil í Føroyum og vitja f‡ra stø›, sum bjó›a seg fram til at h‡sa eini útger›arhavn. Hesi plássini eru Runavík, Sund, Tórshavn og Drelnes. Orsøkin til at ta› eru fólk frá Statoil, sum standa fyri hesum arbei›i er tann, at Statoil hevur fingi› til uppgávu av øllum f‡ra operatørfeløgunum, sum skulu bora á landgrunninum komandi árini, at taka sær av útger›arspurningunum.

John Inderhaug frá Statoil váttar, at teir hava veri› og kanna› umstø›urnar á umrøddu plássum. Teir mangla so bert Drelnes. Endamáli› vi› hesi sokalla›u prekvalifisering, sum ta› eitur á fakmáli, er at vita, um hesi pláss eru egna› til útger›arhavn. Harnæst ver›ur so funni› fram til, hvørjar fyritøkur skulu vera vi› í eini útbjó›ing í sambandi vi› útger›arhavnina.

Sosialurin skilur, at ta› eru 6 ella 7 ymisk feløg, sum bjó›a seg fram tvs. umframt tey nógv umrøddu feløgini, sum umbo›a ávikavist Drelnes, Runavík og Sund, koma fleiri skipafeløg, sum bjó›a seg fram at standa fyri útger›arvirkseminum, sum skal liggja í Tórshavn. Her hava veri› nevnd bæ›i Skipafelagi›, Eimskip og Smyril Line, sum eftir øllum at døma hava gjørt samstarvsavtalur vi› feløg í útlandinum, sum hava ney›uga forleikan tá talan er um útger›arvirksemi.



Eitt av plássunum, sum bjó›ar seg fram til útger›arhavn er Drelnes. Her modell av eini útger›arhavn á Drelnesi.
Mynd jan

Stóri spurningurin ver›ur so, hvørja havn fara oljufeløgini at velja og hvat fer landsst‡risma›urin í oljumálum at siga til teirra val! Hann hevur sum er heimildina til sjálvur at avgera, hvar oljuútger›arhavnin skal liggja. Letur hann oljufeløgini einsmøll taka hesa avger› út frá kommerciellum fortreytum ella fer hann at krevja av teimum, at ta› eisini ver›ur hugt eftir hesum út frá einum regionalpolitiskum sjónarvinkli! Hetta er eisini ein rættiliga áhugaverdur spurningur, tí mett ver›ur, at nettup útger›arvirksemi og skipaflutningur í sambandi vi› boringarnar, ver›ur ta›, sum fer at geva mest av sær í leitiskei›num.

Rentustu›ulin fellur

Sammett vi› ársbyrjan í fjør, ver›ur ta› komandi ár úti vi› 1.000 kr. d‡rari um mána›in at hava sethús. Hægri oljuprísir og renta, umframt lægri rentustu›ul eru høvu›sorsøkirnar til hetta

RENTUSTU‹UL
Jákup Mørk

Sum um høgu oljuprísirnir ikki vóru nóg tung byr›a hjá sethúsaeigarum, so lækkar rentustu›ulin frá 1. januar at rokna. Har afturat kemur eisini, at rentan seinasta ári› er hækka› vi› einum prosentstigi› hjá teimum, sum hava seriulán, me›an talan er um tr‡kvart prosent hjá teimum, sum hava annuitetslán.

Í mun til ár 2000 ver›ur ta› í 2001 úti vi› 1.000 kr. d‡rari um mána›in at hava sethús, um skuldin liggur um hálva mió.kr.

Lækkingin er lógarfest

Sum so er ta› einki óvænta› í tí, at rentustu›ulin nú lækkar, tí hetta hevur alla tí›ina veri› lógarfest. Í lógini um rentustu›ulin ver›ur sagt, at frá og vi› ár 2001 at rokna ver›ur hesin lækka›ur, solei›is at hann í ár 2003 er komin ni›ur á 40%. Rentustu›ulin hevur fram til í ár veri› 48%.

Umframt at rentustu›ulin nú lækkar, er rentan av sethúsalánum, sum nevnt omanfyri, eisini hækka› í árinum, solei›is at ta› í 2001 ver›ur d‡rari at hava sethúsalán.

Ni›anfyri er sett upp ein lítil talva, sum s‡nir, hvørja ávirkan hetta fær, um skuldin í sethúsunum er 500.000. Vi›merkjast skal, at rokna› er ikki vi› avdráttum ígjøgnum ári›, so talvan s‡nir bert á lei›, hvørja meirútrei›slu talan er um.

Sum ta› framgongur av talvuni, so ver›ur ta› komandi ár á gó›ar 300 kr. d‡rari um mána›in hjá einum sethúsaeigara, vi› skuld upp á hálva millión.

Har umframt eru eisini onnur vi›urskifti, sum gera tilveruna hjá hesum d‡rari. eitt nú er oljuprísurin hækka›ur somiki› nógv seinasta hálva anna› ári›, at ver›ur hendan hækkanin írokna›, hevur sethúsaeigarin nærum ein túsundkrónu se›il minni at liva fyri um mána›in.

Er írokna›

Sum nevnt, so hevur ta› alla tí›ina veri› greitt, at rentustu›ulin fór at minka, og hetta hava sethúsakeyparar eisini veri› kunna›ir um, ver›ur sagt úr peningastovnunum.

Dánjal Joensen, deildarlei›ari í Sparikassanum sigur vi› Sosialin, at tá lán ver›a veitt, fær lánveitarin samstundis eitt yvirlit yvir, hvussu nógv ver›ur at gjald í rentum og avdráttum komandi árini.

– Her ver›ur víst, hvussu nógv skal gjaldast á hvørjum ári, og í hesum talvum er innrokna›, at rentustu›ulin fer at falla komandi ári›, sigur Dánjal Joensen.

	2000	2001
Renta	27.500,00	32.500,00
Rentustu›ul	-13.200,00	-14.300,00
At gjalda	14.300,00	18.200,00
Gjald pr. mána›	1.191,67	1.516,67

Kunnu missa rentustu›ul

Sethúsaeigarar, sum raka lofti› fyri rentustu›ul, ver›a ikki kunna›ir um hetta av skattamyndugleikunum. Skal lofti› hækkast, skal hetta gerast innan árslok

RENTUSTU‹UL
Jákup Mørk

Ta› kann koma illa vi› hjá sethúsaeigarum, um tey raka lofti› fyri rentustu›uli í desember mána›i.

Skipanin vi› rentustu›li er hátta solei›is, at í útgangsstø›i ver›ur stu›ul veittur fyri rentuútrei›slur upp til 60.000 kr. um ári›. T.v.s. prosentpartin av hesum tali.

Um so er, at árligu rentuútrei›slurnar av lánum, sum ganga undir stu›ulsreglurnar, eru hægri enn 60.000 kr. um ári›, ber til at søkja um at hækka marki› upp í 120.000 kr. Ein hækkan, i› aloftast er avgrei›slumál hjá Toll- og Skattstovuni.

Søkjast innan árslok

Trupulleikin vi› hesum er, at skal lofti› hækkast upp í 120.000 kr., er ney›ugt, at søkt ver›ur um hetta innan árslok. Ver›ur umsóknin latin eftir árslok, ber ikki til at ganga henni á møti.

Dánjal Joensen, deildarlei›ari í Sparikassanum, sigur, at hetta kann koma illa vi› hjá teimum, sum raka lofti› seinasta mána›in í árinum.

Rentustu›ulin ver›ur nevnliga útgoldin lántakaranum 30. desember. Sostatt ver›ur lántakarin kanska ikki varugur vi› manglandi rentustu›ulin fyrr enn fyrst í januar mána›i, og tá er longu ov seint at søkja.

Dánjal Joensen heldur ta› vera sera óheppi›, at Toll- og Skattstovan onga frábo›anarskyldu hevur hesum vi›víkjandi, men at skipanin bert strikar stu›ulin uttanví›ari.

– Í Sparikassanum hava vit roynt at funni› tey lán fram, sum eru upprætta› í ár, fyri at kanna, um hesi eru um at raka – ella hava rakt – rentulofti›, solei›is at kundin kann lata ney›ugu umsóknarblø›ini inn rættstundis.

–– Hetta er tó eingin trygd hjá øllum lántakarunum, og í seinasta enda er ta› lántakarin, sum stendur vi› ábyrgdini fyri, at hetta ver›ur gjørt, sigur Dánjal Joensen.

Upp móti milliónini

Sostatt munnu hyggjurá›ini vera at lántakarar sjálvir kanna eftir, hvussu nógv tey fáa útgoldi› í rentustu›uli. Er henda upphædd í ár á lei› 2.400 um mána›in ella hægri, ver›ur lofti› allar helst rakt innan árslok, og so er ney›ugt at senda umsóknarbla› inn. Henda upphædd svarar á lei› til eitt lán upp á gó›ar 900.000 kr.

Ver›ur hetta ikki gjørt innan árslok, fellur rætturin til rentustu›ul burtur, og kann hetta merkja, at januar mána›i ver›ur somu 2.400 kr. – ella meira – fátækari at koma ígjøgnum.

TELEBUÐIN

Tórshavn, Sverrigøta 9	tel 31 70 10
Klaksvík, Telefonstøðin	tel 45 74 88
Søldarfjørður, Telefonstøðin	tel 44 10 00
Tvøroyri, Telefonstøðin	tel 37 10 00
Miðvágur, Telefonstøðin	tel 33 20 00
Sandur, Telefonstøðin	tel 36 10 00

www.tele.fo/teleshop